# Maersk Air gjarar út

**Maersk Air bjóðar kundum sínum, sum ferðast úr Føroyum, eina heilt nýggja bonusskipan, sum ikki er kend nakra aðrastaðni í heiminum. Tað merkir tó ikki, at verandi EuroBonus skipnain verður avtikin. Heldur at ein kemur afturat**

FLOGFERÐSLA
*Edvard Joensen*

Ferðafólk, sum ferðast við Maersk Air millum Vágar og Danmark, fáa nú møguleika fyri at royna eina heilt nýggja bonuskipan, sum ikki finst aðrastaðni í heiminum. Skipanin gevur møguleika til einahvørja bonusvøru longu frá fyrsta túri, flogið verður úr Føroyum. Skipanin er bara galdandi fyri ferðafólk, sum skriva seg inn í Vágum.

Skipanin gongur út uppá, at fólk, sum ferðast úr Føroyum fá eitt merki sett á eitt kort, sum tey so kunnu brúka beinanveg ella goyma til seinni brúk, tá tey hava savnað fleiri bonusmerki. 100 stig verða givin fyri hvørja innskriving, og tá ein hevur savnað 500 stig, geva tey rætt til ein ferðaseðil á rutunetinum hjá Maersk Air út í Europa.

Skipanin er persónlig, soleiðis at skilja, at ikki ber til hjá fleiri fólkum í sama húski at savna bonusstig og so leggja saman, so ein kann fara ein túr til Paris ella Athen.

Skipanin líkist eitt sindur EuroBonus skipanini, har tó er galdandi, at tú kanst lata stigini til onnur.

Kasper Gjedsted, sølumaður há Maersk Air, sum saman við Tommy Djurhuus, leiðara á Maersk Air skrivstovuni í Havn, legði skipanina fram, sigur at talan er um heilt nýggja skipan, sum onga aðrastaðni er roynd fyrr yvirhøvur. Og vísir hon eg at rigga væl í Føroyum, er ikki óvist, at hann eisini fer at verða nýtt á øðrum rutum hjá felagnum eisini, sigur hann.

Ein faldari, sum lýsir skipanin, verður borin í hvørt hús í landinum komandi dagarnar, og har ber so til at lesa nærri um skipanina.

Vanliga plaga ymsar treytir at liggja við slíkum skipanum. Men her er bara tann treyt galdandi, sigur Kasper Gjedsted, at ferðast skal við Maersk Air úr Føroyum.

Hóast ein brúkar hesa nýggju Maersk Air Bonus skipanina, er kortini eisini møguligt at nýta EuroBonus.

Bonuskortini, sum eru fest á faldaran, sum nú verður borin út, verða eisini at fáa á ferðaskrivstovunum, sum selja ferðaseðlar fyri Maersk Air. Men skal ein hava vinningar útflýggjaðar, kann tað bara gerast á skrivstovuni hjá Maersk Air í Havn.



*Faldarin, sum lýsir nýggju Maersk Air Bonus skipanina, verður í komandi døgunum borin í hvørt hús í landinum. Skipanin er bert galdandi fyri ferðaseðlar úr Vágum til Danmarkar*

# Trupult hjá Súluni í Sørvági

**Atløguviðurskiftini eru meira at kalla vánalig, har Strandfaraskipið Súlan leggur at í Sørvági. Borgarstjórin metir tað sum landsuppgávu at halda samferðsluhavnir**

SAMFERÐSLA
*Edvard Joensen*

**Sørvági:**
Ferðafólkini, sum ferðast til og úr Mykinesi láta einki at viðurskiftunum, har Súlan leggur at á havnarlagnum í Sørvági. Borgarstjórin í Sørvági metir økið at vera landsmál, og landsverkfrøðingurin sigur, at til teirra er eingin áheitan komin yvirhøvur um at gera nakað við økið.

Fólk, sum ferðast við Súluni kunnu koma út fyri at skula klintrast upp eftir bryggjusíðuni gjøgnum hálar, slíggjutar bilringar, um tey eru so óheppin, at fjøra er, tá tey skulu í land í Sørvági. Grundin er, at ongastaðni er komandi at einum lágum bryggjukanti við Súluni. Har, Súlan fyrr plagdi at fara í slíkum líkindum, er ikki atkomandi nú, tí økið, sum er við sláturvirkið hjá Sørvágs Laksi, nú er stongt vegna smittuvanda. Og inn í bátahylin sleppur Súlan ikki.

Heldur ikki á sjálvum havnarlagnum er nakað sum helst gjørt fyri ferðafólkini. Einki bíðirum ella uppmerking, sum sigur frá ferðaætlan ella øðrum, er at finna yvirhøvur. Ferðaseðlar skulu keypast á flogvøllinum, men einki er, sum sigur fremmandafólki tað.

WC er einki, so tey, sum rættiliga sprongd ganga og halda fyri á bryggjuni, møta av og á einum frelsandi eingli í skapi av havnarfútanum, sum plagar at lata slík ólukkudýr sleppa at lætta sína trongd á havnarskrivstovuni.

Eivin Jacobsen, borgarstjóri í Sørvági, er væl vitandi um trupulleikan, men sigur, at Sørvágs Kommuna metir tað ikki sum kommunalt mál at halda samferðsluhavn. Tað er eitt landsmál, sum Sørvágs Kommuna als ikki hevur tosað um, sigur hann.

Hann sigur, at ein møguleiki kundi verið at gjørt eitthvørt við bátahylin. Men har er so aftur tann trupulleiki, at tað tykist torført at fáa at vita, hvat fyri far verður brúkt til Mykinesleiðina.

– Tosað hevur fyrr verið um ein bát av heilt øðrum dimensiónum enn Súlan, og kommunan hevur ikki hug at gera nakra íløgu til eitt skip, vit ikki kenna, sigur Eivin Jacobsen.

Fyri Vinnumálaráðið umsitir Landsverkfrøðingurin økið, men har er eingin áheitan yvirhøvur komin um at gera nakað við Sørvágs Havn, sigur Oyvindur Brimnes, landsverkfrøðingur.

Strandfaraskip Landsins hava fyrr røkt siglingina, sum nú er boðin út til privat felag at reka. Men framvegis hevur Strandferðslan ábyrgdina av trygd og vælferð hjá ferðafólkunum. Tað eydnaðist ikki at fáa nakra viðmerking frá rætta viðkomandi á Strandfaraskipum Landsins, áðrenn blaðið fór til prentingar.


*Tað er rættiliga trupult at ferðast við Súluni umvegis Sørvágs havn*

*Mynd: Edvard Joensen*




*Eisini í Gásadali, har ein annar tunnil hevur gjørt atgongdina til meginøkið nógv lættari, er eftirspurningurin eftir húsum vaksin.*

*Mynd: Edvard Joensen*

# Populert at búgva í Vágum

**Hús í Vágum verða seld fyri alsamt hægri prísir í eini tíð, har stígur og niðurgongd hava rakt húsamarknaðin í restini av landinum. Tunnilin til oynna verður mettur at vera orsøkin til gongdina, og hann hevur eisini sett stóra ferð á eftirspurningin eftir grundstykkjum vestaru megin Vestmannasund**

HÚSAPRÍSIR
*Rúnar Reistrup*

Alt meðan sethúsaprísirnir í restini av Føroyum standa í stað ella minka, hava sethúsaprísirnir í Vágum framhaldandi beina kós uppeftir. Eini miðal sethús í Vágum kosta í dag umleið 740.000 krónur. Fyri einum ári síðan kostaðu tey umleið 620.000 krónur.

Ì sama tíðarskeiði, sum sethúsaprísirnir í Vágum soleiðis eru hækkaðir við 120.000 krónum, er miðalprísurin fyri eini sethús í Havn lækkaður við umleið 100.000 krónum, vísa sethúsahagtøl, sum Føroya Sparikassi hevur latið gjørt.

Sambært sethúsahag-tølum Sparikassans, sum byggja á allar vanligar sethúsasølur í landinum, er tað bert í Havn, at verulig afturgongd merkist í sethúsaprísunum. Á smærri bygdunum verða sethús seld fyri nakað tað sama sum í fjør, og á størri bygdum eru prísirnir kanska eitt vet hægri enn sama tíðarskeið í fjør. Fyrstu seks mánaðirnar í ár skiftu samanlagt 46 sethús eigara. Í fjør vórðu 42 hús seld og keypt fyrra hálvárið.

## Vágarnar undantak

Stjórin í Føroya Sparikassa, Bjarni Olsen, kundi fyrr í vikuni við hagtølunum sum grundarlag staðfesta, at stígur var komin í sethúsaprísirnar í Føroyum. Hann spáddi, at prísirnir ikki fara at hækka komandi tíðina, heldur øvugt. Sparikassastjórin metti búskapargongdina í føroyska samfelagnum, lágu fiskaprísirnar og alivinnukreppuna vera høvuðsorsøkirnar til gongdina á sethúsamarknaðinum.

Hendan staðfestingin av stígi á húsamarknaðinum er beinrakin fyri nærum allar Føroyar, men kommunurnar í Vágum eru eitt undantak.

## Tunnilin ger munin

Rósa Samuelsen, borgarstjóri í Sandavági, er ikki í iva um, at undirsjóvartunnilin er beinleiðis orsøkin til at sethúsaprísirnir framhaldandi hækka í Vágum, alt meðan prísirnir standa í stað og lækka í restini av landinum.

- Tilflytingin higar byrjaði rættiliga, tá arbeiðið at gera tunnilin var um at koma á mál og hevur hildið fram til nú. Harumframt er eisini stórur eftirspurningur á summarhúsum, og tað hevur helst alt verið við til at hækka prísirnar, sigur borgarstjórin.

Undirsjóvartunnilin varð skotin ígjøgnum í januar 2002. Uppgerð Føroya Sparikassa vísir, at fyrra hálvár av 2001 kostaðu eini vanlig sethús í Vágum umleið 500.000 krónur í miðal. Fyrra hálvár árið eftir, tá skotið varð ígjøgnum og arbeiðið at asfaltera tunnilin byrjaði, fór prísurin fyri eini sethús í oynni upp á umleið 620.000 krónur. Innan bara tvey ár, frá fyrra hálvári 2001 til fyrra hálvári 2003, eru húsaprísirnir í Vágum hækkaðir nærum 50 prosent.

## Vilja byggja

Men undirsjóvartunnilin hevur ikki bert skrúvað eftirspurningin á gomlum sethúsum upp. Eisini grundstykkini fóru knappliga at ganga sum heitt breyð. Til fyri tveimum árum síðan var vanligt at eitt ella tvey grundstykkir vórðu seld um árið í Sandavági. Nú er støðan ein heilt onnur, bæði í Sandavági og í hinum kommununum í oynni, sum allar hava uppliva nøkulunda somu gongd.

- Vit hava gjørt eina nýggja útstykking við 23 grundstykkjum, og tey eru øll seld. Fýra hús standa har nú, og restin verður bygt innan stutta tíð, sigur Rósa Samuelsen, borgarstjóri.

Í løtuni standa fólk á bíðilista til onnur 15 grundstykkir í Sandavági. Enn er einki útstykkjað, men tað verður allarhelst seinni.

## Fólkatalið veksur

Fólkatalið í Sandavágs kommunu er eisini vaksið seinnu árini. Sambært kommunuskrivaranum í Sandavágs kommunu, Albert Thomassen, búgva góð 30 fólk fleiri í Sandavági í dag í mun til fyri tveimum árum síðan. Nú er vøksturin um at hasa av, men komandi tvey árini verða hús bygd á nýggju grundstykkjunum og tað fer eftir metingum hjá kommunuskrivaranum at hava við sær, at samlaða fólkatalið í kommununi fer at koma upp á umleið 750 fólk. Við ársbyrjan 2001 búðu 684 fólk í Sandavágs kommunu.

## Ung venda aftur

Tað eru fyri tað mesta ung fólk úr oynni, sum hava keypt grundstykkini í Sandavági, meðan tey eru í útlegd, eitt nú í útbúgvingarørindum uttanlands. Sambært Albert Thomassen, kommunuskrivara, høvdu nógv av hesum fólkum helst flutt til Havnar um so var, at tunnilin ikki var komin, tí tað er í Havn at flestu teirra, ið hava útbúgvið seg uttanlands, finna sær arbeiði.

Sambært borgarstjóranum Rósu Samuelsen er barnaansingarpláss ein av høvuðsfortreytunum fyri at fáa ung fólk í útlegd at venda aftur í oynna, og júst barnaansing hevur kommunan gjørt stórar íløgur í seinnu árini, soleiðis at pláss nú er fyri børnunum hjá øllum, ið velja at flyta heim ella út til Sandavágs.